Eyðun Lauritsen

# Nú er mær ovboðið

Løgtingsmenninir Kjartan Joensen og Gerhard Lognberg hava fingið harðar ábreiðslur fyri teirra meining um almennar stovnar (kongaríki) og teirra "tænastuveiting". Vegna dóttur mína, ið lesur til námsfrøðing, hevði eg nakrar konkretar fyrispurningar um sparingar innan Trivnaðartænastuna, og vendi mær tí til Heilsumálaráðið. Kvinnan, ið tók telefonina, var sera fyrikomandi. Hon stillaði meg um frá Peri til Pól, og eingin ivi var um, at hon var ikki sørt frustrerað, tí starvsfólk, ið ætlandi kundu svarað spurningunum vóru antin á fundi, upptikin annars ella avspákaðu.

Til síðst fekk eg fatur á einum frá bygningsdeildini. Hesin royndi sum best at greiða mær frá, men bað meg ringja til Nærverkið. Eg so gjørdi, og til síðst fekk eg fatur á einari kvinnu, ið váttaði, at eg var komin á rætta pláss, og tí byrjaði eg at seta spurningarnar:

**1)** Hvat umfatar arbeiðið hjá Trivnaðartænastuni ?

*Svar:* Hygg á heimasíðuna hjá Nærverkinum

**2)** Hevur Trivnaðartænastan eftirlit við stovnum og sambýlum til menningartarnað ?

*Svar:* Vit hava ikki eftirlit við stovnum og sambýlum – vit reka hesi !

**3)** Hvussu stórar eru sparingarnar á økinum fyri 2011 ?

*Svar:* Tað hevur staðið í Dimmalætting!

**4)** Eru/ verða stovnar niðurlagdir í 2011 vegna sparingar ?

*Svar:* Tað veit eg ikki, tað er ikki mítt øki!

**5)** Er tað ikki onkur, ið kann geva mær eitt svar ?

*Svar:* Eingi fólk eru tøk, tey eru á fundi!

**6)** Hetta kann ikki bera til – eg havi roynt at fingið greiði á hesum í slakar tveir tímar.

*Svar:* Tað kann eg ikki gera við. Eg havi einki við fíggjarviðurskifti at gera – ring til Heilsumálaráðið.

Trupulleikin er ikki tað einstaka starvsólkið, men hetta avspeglar eina ódugnaliga leiðslu. Tí eiga landsins myndugleikar at vera so mikið at sær komnir, at teir tora at fara í holt við hetta økið, soleiðis at sparingarnar verða gjørdar í toppinum og ikki sum nú, har tær í alt ov stóran mun raka tann veika, ið er brúkari av hesum tænastum.

Umsitingin skal undir umsiting, og eigur løgmaður sum hægsti starvsfólkaleiðari straks at fara í gongd við hetta arbeiðið.

---



Bjørn Kalsø
*løgtingsmaður*

# Klaksvíkar Sjúkrahús fyri órætti í miðlunum

*Seinastu dagarnar hava tíðindi í KVF givið eina fatan av, at tað er vandamikið og tíðarspilla at verða innlagdur á Klaksvíkar Sjúkrahús (KS) til heilsubótarviðgerð. Harvið hevur greiði boðskapurin verið, at peningur játtaður til KS er illa farin*

**Einans læknar á LS slopnir framat**

Higartil eru einans læknastjórar, yvirlæknar og yngri læknar á Landsjúkrahúsinum slopnir framat mikrofonini í Kringvarpinum at viðgera áðurnevnda mál. Allir hava teir tíverri verið á einum máli um at niðurlaga virksemið í Klaksvík, fyri síðan at flyta serlæknadeildir, skaðastovu og sjúklingar til Havnar.

**Eingin lækni á KS sloppin á skíggjan enn**

Hóast tíðindini hava ljóðað í góða viku, er eingin lækni á KS sloppin á skíggjan enn at geva eina rættvísa og sanna mynd av tí, sum fer fram á sjúkrahúsinum.

Ei heldur hevur nakar fingið møguleikan at greiða frá, hvønn týdning sjúkrahúsið hevur fyri trygdina í økinum norðanfyri.

**KS stóran týdning**

Tað eru mong, sum hava verið vitni til, hvønn týdning stutta tíðin at koma á KS og holla viðgerðin á staðnum hava fyri økið norðanfyri.

Ikki so sjáldan kemur fyri, at sjúklingar, sum koma í akutta viðgerð á KS, sleppa við lívinum, tí tíðin er mangan avgerandi partur í sjúkraviðgerðini. Nøgdsemiskanningar vísa eisini, at sjúklingar á KS í síni heild eru væl nøgdir við tænastuna, teir fáa.

Umráðandi er tí at virkað verður fyri, at KS framhaldandi sleppur at mennast, sum týðandi partur í okkara heilsuverki í góðum samstarvi við hini bæði sjúkrahúsini, heldur enn at lagt verður upp til stríð millum partarnar.

**Ódámligur tíðindaflutningur**

Tað er óskiljandi, ørkymlandi og ódámligt, at einasti almenni miðil her á landi í so langa tíð hevur borðreitt við so einsháttaðum tíðindaflutningi, um so týðandi mál, uttan at seta spurnartekin við neiliga kritikkin. Tíansheldur at geva fakfólki, sum kundu vart sjónarmiðini hjá KS, møguleikan at koma til orðanna.

Talan hevur higartil ikki verið um góðan fjølmiðlasið í hesum máli. Heldur hava miðlafólk borið brennið á bálið.

Spennandi verður at frætta, um KVF fer at gera nakað fyri at bøta um skaðan? Livst, so spyrst!

---

Nevndin í HUXA

# Føroyingar misbrúka rúsevnir og grá økir

*HUXA er ikki skelkað av rúsevnistrupulleikunum – vit síggja tað hvørt vikuskifti*

**Trupulleikar**

Útvarpið hevur seinastu tíðina varpað ljós á trupulleikan, og tað er ikki ein dag ov seint. Vit føroyingar mugu síggja rúsevnismisnýstluna í eyguni: ímillum okkum finnast fólk, sum bjóða ungum gentum og dreingjum fleiri túsund krónur, um tey smugla nøkur gramm av hasji, amfetamini, ecstasy osfv. til Føroyar. Tað er ikki bara í útlondum, at ungar gentur smugla nøkur hundrað gramm av rúsevnum fyri pengar og narkobarónar: hetta hendir eisini í Føroyum.

**Freistingin**

Hví, spyrja tit? Ein av orsøkunum er tann, at politiið veit um fleiri av narkoinnflytarunum, og hesi fólkini vita, at tollarar og hundar eru við kaiina ella á flogvøllinum, tá ið tey koma í land. Ístaðin fyri at taka váðan, bjóða teir ungum gentum og dreingjum fleiri túsund krónur fyri at smugla rúsevnir inn í landið. Tað kann tykjast løgið, tí váðin at verða tikin er lutfalsliga stórur, men stórur í mun til hvat? Verða tey ungu tikin, fáa tey eina bót. Í ringasta føri nakrar mánaðir í geglinum. Men um tey ikki verða fangaði er vinningurin stórur.

**Gráa sonan**

Tað finst eitt grátt øki í føroysku revsilógini: tað er td. loyvt at innflyta hasjfræ, men tað er ikki loyvt at roykja tað. Fleiri hava gjørt sær gagn av gráu sonuni: hvør minnist ikki hasjskógirnar ymsastaðni í landinum? HUXA finst at, at tað eru grá økir, tí lóggávan er ógreið: annaðhvørt er hasj loyvt ella ikki. Í hesum førunum eru vit av tí áskoðan, at øll framleiðsla og brúk av rúsevnum, bæði bleytum og hørðum, er revsiverdugt. Ikki við bót, men við gegli.

---


